## Carragher vil hava styrk



Jamie Carragher hjá Liverpool sigur, at skal Liverpool medda hægri enn fjórða-plássinum, sum teir nú stríðast fyri at røkka, er neyðugt at styrkja hópin við tveimum ella kanska trimum klassaspælarum. – Tað henda heilt víst broytingar í summar, og hóast summi halda, at tað er langur vegur hjá okkum til toppin, so skal ikki so nógv til. Einir tveir-tríggir spælarar kunnu gera stóran mun, og vit spælarar vilja í øllum førum ikki aftur enda í eini støðu, har vit stríðast fyri at halda fast um fjórða plássið, sigur Carragher.

## Moyes heldur fast um ungdómin

Dan Gosling og Jack Rodwell, sum skutu hvør sítt mál í sigrinum hjá Everton á Manchester United, eru enn tvey dømi um framúr fótbóltsskúlan á Goodison, sum eisini hevur uppalt Wayne Rooney. Rooney skifti tó tíðliga til Manchester United, men David Moyes, manager hjá Everton, óttast ikki, at nýggju stjørnuskotini fara aðrar vegir. – Everton er eitt heilt øðrvísi felag í dag, enn vit vóru, tá Rooney kom fram. Tá stríddust vit í botninum, meðan vit í dag kunnu bjóða okkara spælarum europiskan fótbólt. Tað vísir eisini, hvussu nógv tað hevur at siga, at tú hevur álit frá leiðsluni. Sjálvur siti eg nú á áttanda árið, hóast eisini eg havi upplivað mótgongd. Tú sært eisini við Wenger og Sir Alex, at tað loysir seg, um venjarin fær neyðuga arbeiðsfriðin, sigur Moyes.




Aftast frá vinstru: Kaj á Stongum, Ingi Ole-Jacobsen, Finn Ingi Falkvard, Martin Mikkelsen, Rajko Petrovic, Ragnar í Haraldsstovu, Filip Gram, Emil Mikkelsen, Jón Falkvard.
Fremst frá vinstru: Elias Davidsen, Jákup av Kák, Ólavur Jensen, Johan Petur á Stongum, Sonni Zachariasen, Jákup Hansen, Jón Joensen, Kári Mikkelsen

Mynd: Álvur Haraldsen

### SÍ-Mjølnir 3-0 (25-23, 25-19, 18-25, 25-19):

# Sørvingar sterkari

**Hóast Mjølnir hevur ligið á odda tað mesta av landskappingini, so sær SÍ út til at vera á veg uppeftir. Hetta varð undirstrikað í steypafinaluni hjá monnum leygardagin, har SÍ hevði betru kortini á hondini og spældi tey so væl, at tað rakk til greiðan sigur**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Tað hevur í veruleikanum ikki snúð seg um onnur lið enn Mjølnir og SÍ í manskappingini í vetur. Mjølnir vann á SÍ í Sørvági síðst í oktober, og síðani hava klaksvíkingarnir verið oddalið. Men eftir jóla- og nýggjársteðgin hevur SÍ tikið seg alsamt nærri Mjølnir og er bara eitt stig aftanfyri.

Mjølnir hevði eisini vunnið seg í steypafinaluna, tí liðið var oddalið, tá kappingin var hálvrunnin, meðan SÍ vann báðar tær smáu steypakappingarnar og tann vegin tryggjaði sær atgongd í finaluna.

SÍ hevði í fyrstuni í kappingini ilt við at fóta sær og var í meira lagi svingandi, men í síðstuni hevur liðið víst form og styrki, ið bara peikar ein veg: Uppeftir! Hetta kom eisini til sjóndar í steypafinaluni hjá monnum leygardagin, har SÍ greitt hevði munin, hóast tað tó gjørdist til eitt tapt sett.

Ikki minst spælir inn, at SÍ hevur nógv og javngott fólk, so tí er breiddin avgjørt til staðar, so tað ber til at gera broytingar og justeringar á flestu plássum, uttan at liðið viknar nakað fyri tað. Har eru eisini fleiri ungir spælarar, ið veruliga boða frá, at helst skal roknast við sørvingum í toppinum í mansflogbólti í mong ár enn.

Hinvegin er Mjølnir ikki so væl fyri við manning. Fyri tað fyrsta, so eru klaksvíkingarnir ikki so nógvir, og til finaluna høvdu teir 12 spælarar á dómaraseðlinum, ímóti 14 hjá SÍ. Hartil kemur so eisini, at liðið hjá Mjølnir er væl eldri, tí verður hugt at miðalaldrinum, so eru teir hjá Mjølnir gott og væl fýra ár eldri enn teir hjá SÍ.